# Væleydnað listaframsýning og óført hugnakvøld



*"Tú bar mær ta sól, sum í skýggjum var goymd, tú bar mær boð um sjálvt lívið..", sungu Lis, John og Elisabeth*

**Seinasta fríggjadag læt listaframsýning upp í Ribarhúsi, og um kvøldið var hugnaløta í Mentanarhúsinum. Tiltøkini vóru í samband við, at verkhúsið, Stíggjur, hevur virkað í 10 ár**

TILTØK
*Orð: Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*
*Myndir: Sigvør Nesá*

Autsiders art vekir størri og størri áhuga millum fólk, ikki bara her heima hjá okkum, men eisini úti í heimi.

Listaframsýningin, sum seinastu vikuna hevur verið at sæð í Ribarhúsi í Fuglafirði, var ikki nakað undantak í so máta. Nógv fólk vitjaðu, og meiri enn helvtin av verkunum vórðu seld.

Tey flestu av teimum menningartarnaðu eru sera kreativ og halda seg framat. Tey duga at gleðast um tær gávur, tey nú einaferað hava fingið, hóast tær eru skerdar í mun til tað, sum vit halda vera tað fullkomna.

### Veitslurómur

Hesin dagurin, framsýningin læt upp og veitsla skuldi verða í Mentanarhúsinum, var ein rættiligur veitsludagur hjá teimum menningartarnaðu. Úr øllum landinum komu tey til Fuglafirðar, fyri at gleðast saman við vinum og kenningum.

Tað var formaðurin í MBF, sum segði nøkur orð og alment læt listaframsýniningina hjá Stíggi upp. Leiðarin á Stíggi, Poulina Johannesen, segði eitt sindur um verkhúsið og virkið har.

Tá hon segði frá, at tey nú vóru farin undir at gera flettingarborð, helt Maria í Árnafirði fyri, at tey vóru "garrvill". Hetta fekk láturin fram hesa annars stillu løtuna.

Hugnaløtan í Mentanarhúsinum um kvøldið var ein sonn uppliving.

Tá vit komu inn í forhøllina beint fyri klokkan sjey, var longu stúgvandi fult av fólki, sum bíðaðu at sleppa inn í veitsluhøllina.

Asbjørn Eidesgaard, sum arbeiðir á Stíggi og er ættaður av Eiði, bjóðaði vælkomin og segði, hvat var á skránni fyri kvøldið. Hann skundaði sær at siga, at eftir døgurðan skuldi verða dansur, og tað skiltist, at dansurin so avgjørt var tað, tey øll gleddu seg allarmest til.

Tey, sum komin vóru komin úr Klaksvík, máttu innaftur áðrenn dansurin byrjaði, tí Dúgvan siglir seinasta túrin klokkan 23. Hetta var stórt vónbrot, og ikki var frítt, at okkurt tárið rann eftir kjálkunum.

Men einki gjørdist við tað á hesum sinni - ólíkað tá koyrandi verður gjøgnum undirsjóartunnilin.



*Frank og Vilhelm í góðum veitslulagi. Frank starvast á verkstaðnum, Vón á Argjum, og Vilhelm starvast á Stíggi í Saltangará*



*Alfred Olsen, løgtingsmaður og Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði, vóru við, tá framsýningin læt upp. Aftanfyri síggja vit Anthon, sum var millum teirra, ið komin vóru úr Klaksvík*



*Tey svinga væl - Lis og Magni*



# Óheft felag skal kanna tunnil ímillum Øravík og Hov



**Henrik Old er er so ónøgdur við Landsverkfrøðingin í sambandi við ætlanina at gera tunnil ímillum Øravík og Hov, at hann fer at reisa málið aftur á Løgtingi**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eitt óheft felag skal kanna tilfarið, sum er komið úr fjallinum eftir royndarboringarnar í sambandi við Hovstunnilin.

Tað vil Henrik Old, løgtingsmaður, hava.

Henrik Old er formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum og hann hevur verið nógv uppi í arbeiðnum at fáa tunnil ímillum Øravík og Hov.

Men hann viðgongur eisini blankt, at hann hevur ikki fult álit á Landsverkfrøðinginum í hesum sambandi.

Landsverkfrøðingurin hevur skotið upp at gera tunnil nakað uppi í fjallinum. Men so kom norska felagið, NCC, við eini meting, sum segði, at tað bar væl til at gera tunnilin nakað væl longri niðri á dalinum, sum er nógv tað besta fyri ferðsluna.

Har hevur Landsverkfrøðingurin annars sagt, at fjallið er ov vánaligt at bora tunnil ígjøgnum, men síðani NCC kom upp í leikin, er gjørt av at gera royndarboringar fyri at vita, um tað ber til kortini.

– Tað, sum Landsverkfrøðingurin higartil hevur sagt um fyribils úrslitið av hesum royndarboringum, er so ørkymlandi, at tað ber illa til at hava álit á tí, heldur Henrik Old, løgtingsmaður.

Hann sipar til, at Landsverkfrøðingurin hevur sagt alment, at tilfarið í fjallinum er avbera vánaligt, í hvussu so er summa staðni.

– Hetta er ikki heilt í samsvari við tað, eg annars havi hoyrt, sigur Henrik Old.

Hann heldur somuleiðis, at Landsverkfrøðingurin eigur ikki at lata so illa at frá fyrstan tíð av.

– Tað hevur alla tíðina verið mín fatan, at Landsverkfrøðingurin er ímóti at bora tunnilin niðri í dalinum, sum NCC hevur sagt at tað ber til at gera hann, og sum er nógv betri fyri ferðsluna.

Hann heldur, at tað kann vera ein orøk til, at Landsverkfrøðingurin málar eina so svarta mynd av royndarboringunum.

Henrik Old skoytir uppí, at álitið á Landsverkfrøðingin í hesum málið er ikki styrknað, nú hann hevur sæð, hussu leingi tað hevur tikið at gera hesar royndarboringarnar.

– Tíðliga í vár fekk vinnunevndin at vita, at tað fór at taka einar tríggjar, fýra mánaðir at gera royndarboringarnar. Vit fingu eisini at vita, at varð meiri ferð sett á arbeiðið við tveimum vaktum, styttist tíðin tilsvarandi. Men nú er næstan eitt hálvt ár farið og enn er arbeiðið ikki liðugt. Ætlanin hjá Løgtinginum hevur verið, at grótið úr tunlinum skuldi brúkast til nýggju samferðsluhavnina.

– Men nú verður farið at koyra grót til ferjuleguna úr dalinum inni í Trongisvági og tað er eisini við til at vekja illgruna um, at avgerð longu er tikin um, at tunnilin skal ikki gerast niðri í dalinum, sigur formaðurin í vinnunevndini.

### Óheft felag upp í

Henrik Old leggur afturat, at tað sostatt er trupult hjá honum at hava álit á Landsverkfrøðinginum í hesum máli.

Hann vil tí hava, at eitt púra óheft felag eisini skal sleppa at kanna tilfarið, sum kemur úr royndarboringum.

– Hetta skal vera eitt felag á privata arbeiðsmarknaðinum, sum er vant at bora tunlar, leggur hann afturat.

Hann sigur, at á hendan hátt fær Løgtingið tvær metingar at halda seg til, áðrenn endalig støða verður tikin til, hvar bergholið skal vera, tí so hava teir bæði metingina hjá Landsverkfrøðinginum og tað frá einum óheftum felag at halda okkumt til.

Henrik Old sigur, at so skjótt tað ber til, fer hann at reisa málið aftur í tinginum, har hann fer at spyrja landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm, um hann ikki eisini er sinnaður at fáa ein óheftan stovn at siga sína hugsan um tilfarið.

– Hetta haldi eg er alneyðugt fyri at jarða allan illgruna um, at Landsverkfrøðingurin málar myndina svartari enn hon er, tí at hann innast inni er ímóti at gera tunnilin har.

# Hevur gingið sum smurt í alt summar

**Tað vóru nógv, sum fryktaðu fyri, at tað fór at verða ruðulleiki í ferðsluni rundanum eystaru bryggju, tá ið nýggja Norrøna kom, men higartil hevur tað gingið sum smurt, sigur havnarmeistarin**



*Nógv stúrdu fyri ferðsluruðulleika í Havn, tá ið nýggja Norrøna og nýggi Smyril komu. Nýggi Smyril er ikki komin enn, men fyrsta summarið við nýggju Norrønu, hevur tað gingið sum smurt*

FERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað hevur gingið av tí allar besta at avgreiða bilarnar, sum skulu við Norrønu og Smyrli.

Jónsvein Lamhauge er havnarmeistari í Havn og hann er væl nøgdur við tað, hann hevur sæð higartil.

Tað hava annars verið mong, sum hava stúrt fyri ferðsluruðuleika í havnargøtum rundanum eystarubryggju, tá ið nýggja Norrøna kom í sigling- og serliga tá ið nýggi Smyril eisini kemur.

Nú er nýggi Smyril ikki komin enn, men tað, sum hann hevur sæð higartil í sambandi við bilarnar til og frá nýggju Norrønu, hevur so ikki loypt ótta á Jónsvein Lamhauge.

Hann sigur, at hóast ferðslan er nógv økt, síðani nýggja Norrøna kom, hevur tað gingið avbera væl at avgreiða allar bilarnar.

– Tað vóru tey, sum stúrdu fyri, at bilarðøðini fóru at standa langt niðan í býin, tá ið Norrøna skuldi avstað og helst, tá ið Norrøna og Smyril vóru í Havnini ísenn.

– Men veruleikin er, at bilarøðini eru ongantíð komin so langt niðan, sum niðan á vegin, sigur havnarmeistarin.

Havnarmeistarin vísir á, at verkfallið gjørdi at arbeiðið varð nakað seinkað og tí sá tað leingi eitt sindur ruðulleikakent út. Men nú tað er við at vera liðugt, heldur Jónsvein Lamhauge, at tað sær rættiliga væl út.

### Væl skipað

Hann sigur, at orsøkin til, at tað hevur gingið so væl, er, at stór orka er løgd í at skipa ferðsluna væl sum gjørligt í sambandi við ferjurnar.

– Nógv fólk stendur á parkeringsøkinum og vegleiðir bilarnar. Samstundis er fleiri fólk sett í innskrivingina hjá Smyril Line, so tað hevur gingið bæði skjótt og væl at avgreiða bilarnar.

Og Jónsvein Lamhauge stúrir heldur ikki so nógv fyri gongdini, tá ið nýggi Smyril er komin afturat.

– Verður tað neyðugt, ber tað til at byggja parkeringsplássið út, sigur hann.

Hvussu tað skal gerast, hevur hann onki boð upp á enn. Men ein møguleiki, sum hevur verið nevndur, er at leggja dekk í og at gera økið til eitt parkeringshús í tveimum ella trimum hæddum.

Kortini heldur Havnarmeistarin, at tað er av stórum týdningi ikki at leypa framav.

– Tað er ongin orsøk at ovbyggja økið frammanundan.

Tískil heldur hann, at fyri at skemma økið minst møguligt, eigur tað ikki at vera bygt meiri enn neyðugt og tí heldur hann eisini, at tað er ongin orsøk at byggja meir, fyrrenn trupulleikin vísir seg.